


Thor Magni við bryggju í Havn undir liðini av Merkinum. Mynd oljan.fo/Jan Müller

# Stoltleikin hjá Thor nú í Havn

**Jan Müller**

10.06.2015 - 10:41

Oljan.fo

Tíðliga í morgun kom spildurnýggja frálandsskipið hjá reiðaríinum Thor í Hósvík á Havnina. Thor Magni er ávegis til Kanada, har skipið skal arbeiða komandimánaðirnar fyri seismikkfyritøkuna PGS. Thor Magni, sum er tað fyrsta av tilsamans fýra nýbygningum, hevur verið til arbeiðis í Norðsjónum nú í nakrar mánaðir og hevur skipið roynst sera væl. Sum skilst er PGS, sum hevur gjørt langtíðarsáttmálar við Thor um at leiga øll tey fýra skipini,sera væl nøgt við hetta fyrsta skipið, og tað lovar væl fyri øll systurskipini. Næsta skipið, Thor Modi varð latið eigarunum fyri stuttum, og sambært Gunnbirni Joensen í Ùtvarpinum í morgun, so verður triðja skipið latið beint fyri ólavsøku og síðsta skipið seinni í ár.

Thor Magni liggur við Vestaru Bryggju, beint út fyri gomlu saltsøluna og er bryggjan flaggprýdd, nú hetta er fyrstu ferð, at eitt av nýggju skipunum hjá Thor kemur í føroyska havn. Í dag millum klokkan 15 og 17 er møguleiki hjá almenninginum at vitja umborð.

Thor Magni fer til Kanada í kvøld, eftir at nøkur smærri arbeiði eru gjørd og skipið hevur fingið útgerð av ymsum slag.

**LES EISINI:** Thor hevur nokk at gera í oljuídnaðinum í fleiri ár









